# Hendingar av týdningi

**Tvær stórhendingar í næstseinastu øld hava hvt týdning fyri Miðvág, segði deildarleiðarin í Føroya Sparikassa í Vágum, tá nýggja deild peningastovnsins í Miðvági varð tikin í brúk mánadagin**



*Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa, handaði Ann Margit Davidsen, leiðara í barnagarðinum í Miðvági ein kekk. Aftan fyri sæst Marner Jacobsen, stjóri í Sparikassanum*

*Mynd: Edvard Joensen*

MÓTTØKA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Miðvági:** Bygdarskúlin í Miðvági varð bygdur, og Føroya Sparikassi lat sum tann fyrsti peningastovnurin í landinum við stuttum millumbili. Tað vóru høvuðshendingarnar, Sjúrður Poulsen, deildarleiðari hjá Føroya Sparikassa í Vágum, tók fram, tá Sparikassin alt upp snotuliga um- og útbygda deild í Miðvági mánadagin.

At Sparikasisn hevði nakað tilknýti til Miðvágs, fyrsta hann lat upp í næstseinastu øld, grundaði Sjúrður Poulsen á, at annar kundi Sparikassans yvirhøvur var miðvingur.

Og nú, vísti hann á, kundu vit aftur við tveimum daga millumbili hátíðarhalda bæði bygdarskúlan í Miðvági, sum leygardagin hevði móttøku í samband við, at hann er umbygdur til barnagarð, og Sparikassan, sum mánadagin flutti í nýumvældan bygning.

Leiðslan í Sparikassanum er ivaleyst eisini gjørd varug við hesar hendingar, tí á samkomunu, sum var í Miðvági hendan dagin, handaði stjórin í Føroya Sparikassa, Bjarni Olsen, leiðaranum fyri Útibarnagarðinum í Gamla Skúla í Miðvági, Ann Margit Davidsen, ein kekk upp á 12.000,- krónur.

Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa greiddi á samkomuni frá søgu Sparikassans frá tí, farið varð undir at stovna deildir kring landið. Í Vágum komu deildirnar í sjeytiárunum, og eru í dag tríggjar í tali. Tað arbeiða átta fólk hjá Føroya Sparikassa í Vágum, segði hann.

Stjórin fegnaðist um vakra og snotuliga bygningin, sum hann vónaði fór at verða bæði starvsfólksvinarligur og ikki minst kundavinarligur.

– Tí vit vilja vera mest kundavinarligi peningastovnurin í landinum, segði hann. Vit vilja so saniliga, at starvsfólk okkara skulu hava tað gott, men tað eru kundunum, vit liva av.

Bjarni Olsen fegnaðist eisini um at kunna siga, at meginparturin av arbeiðinum, sum gjørt er við nýggja deildarbygningin í Miðvági, er gjørt av vágafólki. Okkurt er tó, sum fólk og fyritøkur av oynni hava gjørt, men stórabeiðunum hava fyritøku í Vágum staðið fyri.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust mammu, vermammu,
ommu og langommu okkara

**Urbana Alberta Poulsen**
**Tvøroyri**

takka vit hjartaliga.
Takk til heimahjálpina og sjúkrasystrarnar,
sum tóku sær so væl av henni.
Takk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar
og tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur
til kirkjuna. Og takk til tykkum øllum,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Súsanna og Olav**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu
samkenslu tá ið høgt elskaða kona mín, mamma,
vermamma og omma okkara

**Naina Soll**
Sørvágur

andaðist og varð borin til hvíldar.

Takk til sangarar, berarar og gravarar,
takk til tykkum øll, ið á ymsan hátt hjálptu til
og takk til David Johannesen prest fyri tey vøkru orð.

Ein serstøk tøkk til tykkum ið stóðu fyri ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Sørvágs kirkju og takk tit mongu,
ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað á fold.

*Fyri tey avvarðandi*
**Kalle, Annika og John-Heri v/ familju**

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma,
vermamma, omma og langomma okkara

**Olivia Carlsson**
**Tvøroyri**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Jónsvein Bech fyri vøkur orð,
takk fyri blómur og kransar, takk til tykkum,
ið fylgdu henni til tað seinasta hvíldarstað.

**Irene, Ben, Onita, Ovin og Ivan v/ familju**

# Ferðavinnustevnan byrjað

**Ferðavinnustevnan Vestnorden Travel Mart, varð sett á Førya Fornminnissavni í Hoyvík mánakvøldið**



*Borðreitt varð millum annað í einum kappróðrarbáti, sum fingin var niðan til Hoyvíkar til endamálið*

FERÐAVINNA
*Edvard Joenen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Hoyvík:** Eini 400 fólk luttaka á ferðavinnustevnuni Vestnorden Travel Mart, sum Ferðaráð Føroya í hesum døgum er vertur fyri.

Lagt var upp til eina hugnaliga løtu, tá tey fleiri hundrað ferðavinnufólkini hittust í Hoyvík mánakvøldið. Livandi ljós uttanfyri, og livandi tónleikur innanfyri.

Fólk gingu runt og heilsaðust og prátaðu. Nógv kendust, og onkur nýggjur var komin afturat, skiltist. Tó tóktiskt, sum lítið verður tosað um vinnu og vinnuliga avtalur á slíkari samkomu.

Heri Niclasen, stjóri í Ferðaráði Føroya setti stevnuna á samkomuni mánakvøldið. Hann beyð fremmandu gestunum vælkomnum til Føroya og greiddi í stuttum frá, hvat stevnan hevur at bjóða.

Eftir at ferðavinnustjórin hevði sett stevnuna, helt borgarstjórin í Tórshavn, Jan Christiansen, stutta røðu.

Hann beyð vegna vertskommununa eisini fremmandu gestunum vælkomnum og segði eitt sindur um, hvørjar møguleikar Havnin hevur at bjóða. Serliga festi hann seg við tað, sum at stevnuni er knýtt. Eitt nú teir møguleikar, sum finnast við havnarlagið, har Norrøna í hesum døgum liggur sum hotelskip.

Eisini stjórin á Fornminnissavninum, Steffen Stumman Hansen, hevði orðið. Hann greiddi frá savninum og tí, her er at síggja og beyð fólki at hyggja seg um.

Á slíkum samkomum, sum aðrastaðni, har fólk koma saman, verður væl gjørt burtur úr tí, sum í munnin er. Soleiðis var eisini á vælkomusamkomuni hjá Vestnorden Travel Mart.

Hotel Vágar stóð fyri matgerðini, sum var rímiliga siðbundin pinnamatur við ymsum spennandi frávikum, ið líkasum hoyra tí føroyska til.

Eitt, sum fleiri løgdu merki til, var, at á einum av føtunum bar til at smakka súlu. Og so skemtaði sjálvandi onkur við, at nú mundu umboð fyri flogfeløgini bæði, sum røkja regluliga rutuflúgving til Føroya, at fara at meta um, hvør nú átti hesa góðu súlu.

## Rætting

Í grein um skeið hjá Alzheimerfelagnum, sum var í blaðnum í gjár, skrivaðu vit, at umleið sjey prosent av fólki yvir 25 ár kundi metast at hava Alzheimer sjúkuna. Tað er ikki heilt rætt. Tað skal vera sjey prosent av fólki yvir 65 ár.

**blðm.**

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm:

# - Eg boyggi meg fyri landsstýrisavtaluni

**Bjarni Djurholm heldur, at vinnupolititiskt er tað ikki skilagott við avgjaldinum á søtmeti. Tað er ein sannroynd, at heilsumál og vinnumál sjáldan ganga hond í hond, og hóast eg ikki eri fegin um avgjaldið, so kenni eg meg noyddan at boyggja meg fyri avtaluni í landsstýrinum, sigur landsstýrismaðurin í vinnumálum**

AVGJALD Á SØTMETI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Síðan tað kom fram fríggjadagin í farnu viku, at landsstýrið hevur ætlanir um at leggja avgjald á søtmeti, hevur stórt kjak stungið seg upp. Ætlanin hjá landsstýrinum við avgjaldinum er at tálma nýtsluni av sodavatni og góðgæti hjá teimum ungu.

Grundgevingin er bygd á heilsustøðuna hjá teimum ungu, sum ikki verður mett at vera nóg góð, tí tey eta ov nógv ósunt. Tað eru deildar hugsanir um endamálið hjá landsstýrinum, tí fleiri hava róð frammundir, at veruliga orsøkin til avgjaldið er, at tað táttar í á fíggjarliga økinum, og fyri at fáa endarnar at røkka saman, leggur landsstýrið nú avgjald á søtmeti. Inntøkurnar av avgjaldinum verða mettar til góðar 20 mio. krónur.

Vinnuhúsið og andstøðutinglimir siga seg ganga ímóti ætlanini hjá landsstýrinum. Fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, segði í Dimmalætting mánadagin, at við avgjaldinum fáa tey ungu nýtt minni av lummapeningingum til góðgæti, og tað sá hann ongan trupulleika í.

Eisini formaðurin í Fyribyrgingarráðnum, Heðin Thomsen, tekur undir við avgjaldinum, og vísti á í Útvarpi Føroya mánakvøldið, at royndir við tubbaksgjaldi hava víst, at avgjøld tálma nýtsluna, og tí kundi hugsast at sama søga var við søtmetinum.

### Uppgávan at halda avgjøld niðri

Vinnulívið í Føroyum hevur seinastu dagarnar hartað landsstýrinum fyri avgjaldið, og landsstýrismaðurin í vinnulívinum skilir væl støðuna, tí vinnupolitiskt er tað ikki skilagott við avgjøldum, sigur Bjarni Djurholm.

Hann var ikki sjálvur á fundinum í seinastu viku, har avgjaldið varð viðgjørt, og hóast tað býður honum ímóti, so kennir hann seg noyddan at boyggja seg fyri avtaluni.

– Tað er sannroynd, at heilsumál og vinnumál sjáldan ganga hond í hond, og avgjaldið rakar sjálvsagt mítt øki, bæði á sølu og framleiðslu síðuni, men eg fari at boyggja meg fyri avtaluni, hóast tað primera altíð er at royna at halda avgjøldum niðri, sigur landsstýrismaðurin í vinnumálum.



*– Tað er sannroynd, at heilsumál og vinnumál sjáldan ganga hond í hond, og avgjaldið rakar sjálvsagt mítt øki, bæði á sølu og framleiðslu síðuni, men eg fari at boyggja meg fyri avtaluni, hóast tað primera altíð er at royna at halda avgjøldum niðri, sigur landsstýrismaðurin í vinnumálum.*

*Mynd: Savnsmynd*

Berghild Gullaksen, tannarøktari í Klaksvík:

# -Skilagott við avgjaldi á søtmeti

**Tannarøktarin hjá børnunum í Klaksvík, Berghild Gullaksen, heldur, at inntøkurnar av avgjaldinum á søtmeti áttu at verið nýttar til gera mjólk og frukt bíligari at keypa. Tað er skilaleyst, at góðgæti og sodavatn skulu vera bíligari enn mjólk og frukt, sigur Berghild Gullaksen**



*Tannarrøktarin á skúlatannlæknastovuni í Klaksvík heldur tað er skilaleyst, at góðgæti og sodavatn er bíligari enn mjólk og sodavatn, og tí átti inntøkurnar frá avgjaldinum á søtmeti verið nýtt til at gera mjólk og frukt bíligari.*

*Mynd: Solby A. Eliasen*

AVGJALD Á SØTMETI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tannarøktarin á skúlatannlæknastovuni í Klaksvík, Berghild Gullaksen, er fegin um ætlanirnar hjá landsstýrinum at leggja avgjald á søtmeti. Í starvi sínum hevur hon dagliga samband við børn, sum kenna avleiðingarnar av ov nógvum sodavatni og góðgæti.

Berghild greiðir frá, at størsti trupulleikin í løtuni eru ung frá fjúrtan árs aldri.

– Hjá børnum upp til fjúrtan ár gongur avgjørt rætta vegin, men tá tey koma upp í sjeynda flokk steðgar á, og tá hava tey nógv hol í tonnunum, sigur tannarøktarin.

Hon vísir á, at serliga eru tað sodavatnsfløskurnar úr plastikki, ið geva nógvu holini hjá tannáringunum.Tey ungu eta eisini ov nógv góðgæti og wienarbreyð og hetta sæst avgjørt aftur á tonnunum.

Berghild heldur, at inntøkurnar av avgjaldinum av søtmeti áttu at verið nýttar til at gera bæði mjólk og frukt bíligari at keypa, tí í dag kostar bæði sodavatn og góðgæti minni enn mjólk og frukt, og tað er skilaleyst.

### Nógv upplýsing

Skúlatannlæknastovan í Klaksvík hevur seinastu árini gjørt nógv við at upplýsa um vandan av ov nógvum søtmeti. Umboð fyri tannlæknastovuna hava verið við til foreldrafundir á skúlunum, har heitt hevur verið á foreldrini at geva børnunum góðar matvanar, so tað slepst undan nógvu óneyðugu holunum hjá teimum ungu.

– Vit hava heitt á skúlaleiðslurnar um at royna at geva børnunum frukt ókeypis ella fyri ein bíligan penga. Hetta átak kundi verið ein loysn fyri tað nógva góðgætið, ið verður etið í dag, greiðir Berghild Gullaksen frá.

### Foreldrini stóra ábyrgd

Berghild Gullaksen leggur stóran dent á, at tað eru foreldrini, ið hava størstu ábyrgdina av at busta tenninar hjá børnum, og hjálpa teimum við at fáa rættar matvanar.

– Eg havi hoyrt frá summum barnagørðum, at í matpakkanum hjá børnunum eru bæði sunkist og kitkat, og tað er stak óheppið. Eg má staðiliga gera vart við, at tað er uppgávan hjá foreldrunum at syrgja fyri at børnini fáa ein orduligan matpakka, so tey ikki eta góðgæti allan dagin, tí tað tænir ongum endamáli, sigur Berghild Gullaksen at enda.

## Vinnumálaráðið ætlar at spara 3%

**Bjarni Djurholm vil ikki siga nakað um, hvar hann ætlar at spara komandi ár**

FÍGGJARLÓGIN KOMANDI ÁR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fyri góðum mánaði síðan skuldu landsstýrismenninir á teimum ymisku økinum handa Karsten Hansen uppskot um teirra part á fíggjarlógini fyri komandi ár.

Sum skilst í teimum ymisku fjølmiðlunum seinastu vikuna, so verður tað alt annað enn lætt hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum at fáa kabalina at ganga upp.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm sigur, at arbeiðið á Vinnumálaráðnum varð eisini liðugt fyri einum mánaði síðan, og uppskotið leggur upp til økini undir vinnumálum ætla at spara 3 % í mun til fíggjarárið 2003. Spurdur um á hvørjum økjum spart verður á, svarar Bjarni Djurholm, at tað vil hann ikki koma nærri inn á.